## Úttikin seinast – vakt hesaferð

Tað er neyvan nógva staðni í heiminum, at tað ber til men í Føroyum er tað soleiðis. Til dystin í móti Serbia var Palli Augustinussen úttikin til bruttohópin. Hesaferð hevði Brian Kerr valt at síggja burtur frá suðuroyinginum, sum tó kortini var á Tórsvølli, tá áðrenn, undir og eftir dystin. Palli Augustinussen er nevniliga løgreglumaður og var vakt nú franskmenn vitjaðu, so hann kom rættiliga nær heimsstjørnunum hóast alt.



## Gunnar og Evra

Gunnar Lydersen var ein av teimum ungu, sum var so heppin at fáa eina mynd saman við einum av fronsku heimsstjørnunum eftir dystin. Sjálvur heldur Gunnar Lydersen við Manchester United, og tí passaði tað honum ógvuliga væl, at tað hann fekk eina mynd av sær og Patrice Evra. – Hetta var deiligt, helt Gunnar Lydersen fyri, tá hann hevði fingið myndina. Somuleiðis var hann eisini væl nøgdur við føroyska landsliðið og tað, teir vístu á vøllinum í gjár.




støddini. Tóktist at hugsa nógv um verjupartin, har hann gjørdi tað væl, men var ikki eins frekur og avbjóðandi í framrættaða spælinum, sum vit hava sæð tað fyrr. Hevði tó fleiri góðar avleveringar og er beinleiðis orsøkin til, at føroyska liðið var vandamikið við so at siga hvørja einastu deyðbóltsstøðu. Eitt ótrúliga umráðandi og avgerandi vápn í føroysku royndunum at fáa eitt mál.

### 10. Christian Lamhauge Holst, 15/2

Spældi bara ein lítlan hálvan tíma, áðrenn hann noyddist at lata seg tó væl og gjørdi sítt til at stressa verjuna. Kom í rímiliga skotstøðu einaferð, men valdi at spæla bóltin heldur enn at skjóta sjálvur, sum hann kanska burdi gjørt.

### 11. Bogi Løkin, 8/1

Rann – sum vanligt – vøllin upp og niður. Kom tó ikki eins væl aftur við at hjálpa Jónasi á bakkinum, eins og vit hava sæð tað áður. Takkaði tó Brian Kerr fyri álitið og endurval við millum annað at vinna Føroyum trý fríspørk í frálíkari støðu, langt frammi í høgra borði, ið eisini vóru upphav til fleiri vandastøður í franska feltinum. Valdi oftast tryggu av tí sama hevði Bogi ógvuliga fá bólttap, sum kunnu kosta nógv. Varð fluttur inn sentralt á miðvøllin móti dystarenda, sum eisini er eitt pláss, Bogi kann røkja.

### 14. Jákup á Borg, 58/2

Fekk bara fimm minuttir á vøllinum, sum er ov lítið til at gera eina meting av. Fekk tó skapt størsta føroyska kjansin, tá hann í yvirtíðini stútaði eitt innkast frá Jónasi Þór Næs beint framvið málinum.

### 17. Jann Ingi Petersen, 13/0

Toftamaðurin fekk ein góðan

Maðurin, sum hevur verið uttanfyri landsliðshitan í fleiri ár, hevur nú spælt sín næsta landsdyst undir Brian Kerr, og tað er fult uppiborið. Arbeiddi eins og restin av liðnum væl og tordi eisini at móttaka bóltin.

### 18. Jóan Símun Edmundsson, 1/0, B68

Fekk ein góðan tíma í sínum fyrsta landsdysti nakrantíð. Jóan Símun Edmundsson prógvaði vissuliga, at úttøkan av honum var fult uppiborin. Deiliga ósmæðin kom toftamaðurin á vøllin. Fleiri ferðir vann hann bóltar frá fronsku

**Tað eru nógv, nógv ár síðani, at at føroyska landsliðið hevur verið mannað við júst somu leikarum tveir dystir á rað, men hetta er støðan nú somu ellivu byrjaðu inni móti Fraklandi sum móti Serbia**

**Mynd: Jens Kr. Vang**

arbeiddi væl í verjupartinum í samband við deyðbóltar. Spurningurin er nú, um 18 ára gamli toftamaðurin hevur spælt sín seinasta ungdómslandsdyst.